Nr. 74 - 20. apríl 2004 ítróttur 25

# Stórskjúttarnir vóru tey størstu

**Tað gjørdust toppskjúttarnir í landskappingini, sum fóru við heitinum sum ársins leikarar, og serliga hjá Damir Oros var talan um ein av teimum heilt góðu døgunum**

GALLAKVØLD
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einki var at taka seg aftur í, at nógv varð lagt fyri, tá gallakvøldið í hondbólti stóð á skránni leygarkvøldið.

Tá avtornaði vóru úti við 200 hondbóltsfólk við tilhoyri, sum sessaðust við borðið, og eftir eitt sera væleydnað borðhald, sum ein vælupplagdur Satsavertur stílaði fyri, var tíðin loksins komin til løtuna, tá tað skuldi avdúkast, hvørji vórðu kosin tey bestu í árinum, sum fór.

## Toppskjúttarnir størst

Og tað skuldi vísa seg, at tað gjørdust toppskjúttarnir í vetur, sum fingu størsta heiðurin hetta kvøldið.

At Simkona Dziugyte og Damir Oros skuldu fáa heitið sum toppskjúttar, var eingin loyna, men gleðin var stór, tá júst teirra nøvn eisini vórðu rópt upp sum tey seinastu, tá ársins leikarar vórðu avdúkaðir. Hjá Damir var hetta enntá triðja ferðin, at hann var á pallinum, tí hann fekk eisini heitið sum ársins álopsleikari, so einki er at siga til, um stórskjúttin var meira enn væl nøgdir, tá hann fór heim við ikki færri enn trimum steypum við tilhoyrandi blómuprýðum. Og ivaleyst mundi hann vera fegin um, at talan í ár var um nøkur heldur minni steyp, ístaðin fyri veldugu pokalarnar, sum ofta verða býttir út á slíkum kvøldum. Tað vildi í øllum førum verið mest sum ov nógv av tí góða, um tað vóru trý risa-steyp, sum skuldu verið við í førninginum hetta kvøldið.

## Fult uppiborið

Og um heiðrarnar er annars at siga, at tey í nógv teimum flestu førunum vóru á leið soleiðis, sum fólk flest høvdu roknað við.

Ársins málverjar gjørdust Lidija Vlaovic úr Stjørnuni og Zeljko Jotic úr Neistanum. Hjá Lydiju man tað her uttan iva vera endaspurturin í landskappingini, sum veruliga dróg uppeftir, har hon fleiri ferðir hevði avgerandi leiklut, tá stigini skuldu verjast. Hjá Jotic var tað kanska í størri mun avrikið yvir eitt heilt kappingarár, har hann støðugt taldist millum teir bestu á Neista-liðnum, tó at tað ikki var nóg mikið til at tryggja teimum gullmerkini í landskappingini.

At Sámal Joensen man vera besti verjuleikarin í landinum, man lítil ivi vera um. Í fjør var hann als ikki við í kappingini, tá hann var úti við krossbandsskaða, men leygarkvøldið fekk hann so fyri triðju ferð í fýra ár heiðurin sum ársins verjuleikari, og tað mundi neyvan vera nakar, sum mutaði ímóti hesum.

Hjá kvinnunum fall heiðurin her á liðskiparan hjá Stjørnuni, Unu Olsen. Ikki minst man tað vera stríðsvilji hennara, sum her hevur vigað tungt, og tó at aðrar eisini royndu at geva henni kapping í hesum, so megnaði hon at halda allar aftan fyri seg.

## Uppløgd stjørnuskot

Álop snúgva seg um mál, og tað er einki at ivast í, at málmaskinan hjá KÍF var favoritturin til at taka heitið sum ársins álopsleikari. Vegna skaða leikti hann bara 15 av teimum 20 dystunum í kappingarárinum, men hann endaði kortini ovastur á máltindinum.

Hjá kvinnunum fall valið her á Aukse Vysniaskaite úr VB, sum í nógvum dystum var tann spælarin hjá VB, sum tryggjaði stigini, og við gjøgnumbrotsstyrki síni var hon alt kappingarárið á tamb ein støðug hóttan móti mótstøðuverjunum.

Á venjarasíðuni skuldi eisini gerast av, hvørjir vóru teir bestu, og hjá kvinnunum var tað her meistaravenjarin, Rógvi Nielsen, sum fekk heiðurin. Hjá monnunum fall valið á Henrik Gerster úr H71, og fagnaðurin var ovurstórur, tá hann fór fram eftir síni viðurkenning. Tað mundi her fyrst og fremst vera avrikið í steypakappingini, sum førdi hann á tindin, tí undan kappingini var tað neyvan nakar, sum ímyndaði sær, at H71 skuldi gerast partur av hesum dystinum.

Stjørnuskotini plaga vanliga at vera eitt av stóru hæddarpunktunum á gallaveitsluni, og soleiðis var eisini hesaferð. Í mun til so ofta fyrr, so var tó rættiliga upplagt hesaferð, hvørji skuldu fáa heiðurin. Tomma Petersen úr VÍF hevur í ár strítt seg fram til ein leiklut, ið er mest átøkur fyrsta-málverja hjá felagnum, og umframt heitið sum ársins stjørnuskot, varð hon eisini nummar tvey, tá ársins málverjar vórðu kosnir.



*Tey bestu vórðu heiðraði, tá gallakvøld var á skránni leygarkvøldið*

Hjá monnunum hevur Gert Hansen úr KÍF tikið øll á bóli í vetur. Bæði í verju- men serliga í álopspartinum hevur hann verið ein av grundstuðlunum undir KÍF liðnum, og tó at teir aftur í ár endaðu niðastir, so mundi tað kennast hugaligt, at teir tóku ikki færri enn fýra steyp á degnum.

## Dómarar til diskussión

Seinastu steypini undan handanini til ársins leikarar, vóru steypini til besta dómaraparið.

Her gjørdust tað Sámal Hansen & Kristian Johansen, sum fingu heiðurin. Og tað var ikki ein avgerð, sum hóvaði øllum eins væl.

Serliga vestmenningar vóru ónøgdir um hetta, og tað er einki at ivast í, at tað var ein dómaraavgerð í seinastu sekundunum av seinasta dystinum, sum var orsøk til hetta.

Men steypini vórðu so kortini handað, og um ikki annað, so syrgdi hetta fyri, at mongu fólkini høvdu nakað av hondbólti at tosa um, tað sum eftir var av kvøldinum. Og tó at klokkan um hetta mundi mundi líða til midnátt, so vóru enn nóg so nógvir tímar eftir av einum kvøldi, sum í allar mátar má bera heitið sum sera væleydnað.

Fyrireikararnir høvdu í øllum førum lagt eitt rimmar-arbeiði í hetta, og flestu veitslugestirnir mundu eisini taka undir við, at talan gjørdist um eitt framúr kvøld.

## Tey bestu

**Ársins toppskjútti**
*(Steyp latið av Føroya Bjór)*
Kvinnur: Simona Dziugyte, Neistin
Menn: Damir Oros, KÍF

**Ársins málverji**
*(Kjølbro Heilsøla)*
Kvinnur: Lidija Vlaovic, Stjørnan
Menn: Zeljko Jotic, Neistin

**Ársins verjuleikari**
*(Sp/f Oddvør)*
Kvinnur: Una Olsen, Stjørnan
Menn: Sámal Joensen, VÍF

**Ársins álopsleikari**
*(Suðuroyar Sparikassi)*
Kvinnur: Aukse Vysniaskaite, VB
Menn: Damir Oros, KÍF

**Árins venjari**
*(LM-handilin)*
Kvinnur: Svein Rógvi Nielsen, Stjørnan
Menn: Henrik Gerster, H71

**Ársins stjørnuskot**
*(Blómuhandilin, Fípan)*
Kvinnur: Tomma Petersen, VÍF
Menn: Gert Hansen, KÍF

**Ársins leikarar**
*(Atlantic Airways)*
Kvinnur: Simona Dziugyte, Neistin
Menn: Damir Oros, KÍF

**Ársins dómarapar**
*(Sveisingahandilin)*
Kristian Johansen &
Sámal Hansen, Neistin



*Simona Dziugyte úr Neistanum fekk bæði heiðurin sum ársins toppskjútti og ársins leikari, so einki er at siga til, at smílið var stórt, tá hon fyri aðru ferð trein á pallin*



*Damir Oros úr KÍF sær ikki sørt bilsin út. Fyri triðju ferð á kvøldinum hevur hann verið á pallinum. Hesa ferð sum ársins leikari*



*Ársins stjørnuskot hjá monnum gjørdist Gert Hansen úr KÍF, og ikki minst millum liðfelagarnar vakti hetta stóra gleði*



*Navnið á Henrik Gerster er júst rópt upp, og fagnaðurin við H71 borðið er ovurstórur*